Lagt til rættis: Rigmar Dam
Myndirnar tóku:
Jens Kr. Vang
Eirikur Lindenskov
Rigmor Dam

# Eg eri stak væl nøgdur



**Tað sigur stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, sum var ein av høvuðsfyrireikarunum av Clinton vitjanini. -Alt gekk sum tað skuldi, so tað fekk valla verið betri**

CLINTONVITJAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

- Tað klappaði alt, so vit kundu ikki verið betri nøgdir, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

*Hvat hugsaðu tit, tá tit frættu, at hann ætlaði sær ein túr oman í býin?*

- Tað vistu vit faktiskt einki um, tí vit sótu uppi í Norðurlandahúsinum til fyrilesturin hjá Hans Blix tá. Clinton skuldi hava fyrilestur kl 15.00, og tá klokkan nærkaðist, frættu vit, at hann var á veg niðan úr býnum. Men tað var stuttligt, at hann fekk ein túr, og at fólk fingu høvi at heilsa uppá hann, sigur Jan Mortensen.

*Fekk tú eisini høvi at heilsa uppá hann?*

- Ja, eg, formaðurin í arbeiðsgevarafelagnum og stjórin í Norðurlandahúsinum tóku ímóti honum, tá hann kom niðan í Norðurlandahúsið. Eg má siga, at hann var júst tann fyrikomandi maðurin, sum man hevur sæð so ofta í sjónvarpinum. Og fyrilesturin hjá honum var eisini góður. Hann dugdi væl at gera tað viðkomandi, tí hann dróg Føroyar og føroysk viðurskifti inn í globalu spurningarnar.

*Hava tit nú fingið mót uppá at endurtaka hetta tiltakið, og møguliga fáa onkran annan verðinsmann til Føroya?*

- Nei, tað hava vit ongar ætlanir um. Vinnuhúsið er til fyri at veita eina ávísa tænastu, ikki fyri at vera arrangør av slíkum tiltøkum. Vit vildu bert vísa, at tað ber til at fáa slíkar statsmenn og heimsmenn til Føroya.

*Og er endamálið við vitjanini rokkið?*

-Ja, eg haldi at vit hava ávíst, at hetta kann lata seg gera í Føroyum, og eg haldi, at vit í gjár øll kendu eitt ávíst søguligt veingjasuð. Og so er tað parturin uttanfyri Føroyar. Har fara vit í næstum at gera eina eftirmeting, fyri at síggja hvørja ávirkan vitjanin hevur havt. Men vit byrja longu at síggja ringarnar breiða seg, m.a. er eitt longri innslag at síggja á heimasíðuni hjá Jyllandsposten í morgun. Og tað hevur eisini verið okkurt at sæð í øðrum útlendskum bløðum, sum eru komin út í morgun. So samanumtikið má eg siga, at eg eri stak væl nøgdur við alt tiltakið, sum tað var.

Síggið og hoyrið Bill Clinton á Portalinum

Tey, sum ikki høvdu høvi at vera í Norðurlandahúsinum í gjár, kunnu síggja og hoyra Bill Clinton á Portalinum.

Krøvini til fjølmiðlafólkini vóru strong, í sambandi við fyrilesturin hjá Bill Clinton og Hans Blix í gjár. Avgjørt varð frammanundan, hvør kundi taka myndir og hvør kundi taka upp sjónvarp.

Alt tilfarið var lagt á eina heimasíðu hjá Vinnuhúsinum, sum øll fjølmiðlafólk so kunnu brúka, sum teimum lystir.




Leinkjan til kykmynd av Bill Clinton er: http://www.portal.fo/?page=kykmyndir&km=128

# Myrkamorreyð Harley-troyggja til Clinton



**Bill Clinton er tiltikin Harley Davidson-fjeppari, tí fekk hann eina føroyska troyggju í eyðkendu litunum hjá Harley Davidson.**

CLINTONVITJAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað var lagamanni hjá føroyskum Harley viðhaldsfólkum at gera okkurt serligt burtur úr hátíðarligu vitjanini. Tøting í Gøtu hevur gjørt hesa serligu føroysku Harley Davidson troyggjuna, sum er í eyðkendu litunum hjá heimskenda lívsstílsmerkinum Harley Davidson. Troyggjan er traditionella myrkamorreyða troyggjan við silvurknappum á aðrari økslini. Bulurin er myrkamorreyður, ermarnar gráar og hálsurin appilsingulur. Tað var Ove Ritter, sum er umboðsmaður fyri Harley í Føroyum, sum hevði skipað fyri.

Hann var so heppin sjálvur at sleppa at handa fyrrverandi forsetanum troyggjuna uppi á Hotel Føroyum, har tann størsta



Harley motorsúkklan, sum nakrantíð hevur verið í landinum, varð sýnd fram.

- Bill Clinton var so umhugsin, at hann signeraði tangan á súkkluni. Eisini fekk eg eitt lítið prát í ein minutt ella so við hann, sigur ein fegin Ove Ritter. Hann fer nú at gera sítt til, at føroyska Harley troyggjan verður sett í framleiðslum, so hon kann vera partur av rúgvismikla úrvalinum hjá Harley Davidson.

**Rd.**

## Gongutúrur í havnargøtum






